


# Enn eitt Thor-skip sjósett í Turkalandi

Deil:

**Jan Müller**

16.12.2014 - 20:46

Oljan.fo

Mánadagin 15. desember varð M/V Thor Modi sjósettur á Besiktas skipasmiðjuni í Turkalandi.

M/V Thor Modi er næstur í røðini av fýra nýbygningum hjá felagnum Thor, sum eru serútgjørdir til fleirtáttaðar tænastur fyri seismikkskip. Skipini verða øll flokkað í hægsta umhvørvis- og ísklassa nevnt: Clean Design, Recyclable og Ice-1A og verða 64,4 metrar til longdar og 2015 BT til støddar.

Fyrsta skipið í hesi røð varð sjósett í august, og tey næstu tvey skipini M/V Thor Frigg og Thor Freia eru væl ávegis. Øll fýra skipini verða latin felagnum í 2015.

Skipini eru nevnd eftir gudum í gomlum norrønum frásagnum og umboða m.a. megi, dirvi, kærleika, vakurleika og vísdom.

Tey fýra skipini hava øll tænastuavtalur fyri norska seismikk-reiðaríið Petroleum Geo-Services (PGS) skrivar Thor á síni heimasíðu.